


# BILRADIO

**Aktuel biltíðindi við Maggi Gunnarsson**

## Hósdagin 16. september kl. 16.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 16. september verður samrøða við Oliver Andreasen á Argjum, sum fortelur um sínar gomlu bilar og um áhugan fyri bilum.
Eisini er samrøða við Steinfinn Mittelstein, Hannis Joensen og Heðin Mortensen, fyrrverandi starvsfólk hjá Wenzel Petersen, sum savnast aftur leygardagin 25. september. Wenzel Petersen var ein stór fyritøka við t.d. bilmekanikarum, maskinmonnum, rørsmiðum, jarnsmiðum, blikksmiðum og skrivstovufólkum. Fyritøkan umboðaði m.a. Ford bilar og Alfa-Diesel motorar.



# Down Syndrom dagur

**Leygardagin 25. september frá kl. 14 til 18 verður Down Syndrom dagur í Bowlinghøllini í Leirvík**

Hey øll við Down Syndrom við familju! Nú halda vit at tíðin er komin til at hittast aftur.

Vit møtast í Bowlingahøllini í Leirvík leygardagin 25. september 2010 frá kl 14 til 18.

Vinarliga sigið okkum frá, um tit hava hug at vera við, í seinasta lagi hósdagin 23. september.Dagurin er fyri tey við Down Syndromi og familjur teirra. Stuttligt hevði verið at sæð øll tykkum nýggju, sum ikki hava verið við fyrr.

Tit eru vælkomin at ringja og frætta nærri og tekna tykkum hjá Jastrid Weihe tel. 228077
ella Elin Noru Reines tel. 211382.

***Vegna fyrireikararnar***

# September-kappingin

**Vinnarin av august kappingini:**
**Elsebeth Johannesen**
**Millum Gilja 32**
**188 Hoyvík**

Sosialurin

## SUDOKU

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 4. oktober 2010 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

**Drigið verður í viku 40.**

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 5 | | 8 | 3 | | | 1 |
| | 1 | 9 | | | | | 6 | |
| 4 | | | | | | 8 | | |
| | 6 | | | 1 | | 9 | | |
| 5 | | | | | | | | 8 |
| | | 3 | | 4 | | | 7 | |
| | | 6 | | | | | | 4 |
| | 5 | | | | | 2 | 9 | |
| 3 | | | 4 | 2 | | 7 | | |

Vinningurin í september er ein **BlackBerry Gemini - 8520** fartelefon frá **Vodafone**

**Virði tilsamans: kr. 3.495,-**

Navn:____________________
Bústaður:__________________
Telefon:___________________

## Fakta um BlackBerry Gemini - 8520

- Egið minni 256 MB
- Møguleika at útbyggjað minni upp til 32GB
- MicroSD minnskorti
- Bluetooth 2.0 við A2DP
- Wifi 802.11 b/g
- Stand-by 408 tímar (17 dagar)
- Talutíð 4 tímar og 30 minuttir
- 2 MP-myndatól
- Media player
- Tónleika spælari MP3/AAC/AAC +/WMA/ASF
- Video spælari H.263/H.264/ WMV
- BlackBerry maps
- Blackberry Messenger



**Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn**
**Merkið brævbjálvan »Sudoku«**

vodafone
power to you